Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Fíggjarligar avleiðingar av kongsvitjan

Spurningar:

1. Hvør er metta samlaða nýtslan hjá landskassanum í samband við kongsvitjanina í summar, heruppií eisini innanhýsis umraðfestingar og arbeiðsorka, sum annars hevði verið brúkt til annað?

Viðmerkingar:
Í uppskoti til eykajáttanarløgtingslóg á vári 2024 (lm. 115/2023) verður biðið um 700.000 krónur afturat til løgmansskrivstovuna í samband við kongsvitjanina.

Semja tykist vera um, at fíggjarliga ávirkanin av vitjanini er størri, men tað tykist ikki greitt, hvussu nógvar pengar og arbeiðsorku vitjanin fer at kosta.

Á Løgtingi, 15. apríl 2024

Eirikur í Jákupsstovu